gult cyan magenta svart

Tann svarti riddarin Woyzeck

Tom Waits er ikki heimskendur sum so. Hann hevur altí› hata poppheimin, sjálvt um eitt av hansara stóru idolum í dag, er Prince. "Hann er totalt kompromileysur", sigur Waits. Um popheimin sigur hann, "ta› er betri at síkja seg inn gjøgnum bakdyrnar, enn at ver›a bo›in vi› inn í henda heimin"

Oddfrí›ur M. Rasmussen

Tann 14 november var heimspreimiera á Betty Nansen teatrinum í Keypmannahavn.

– Hvat hevur hetta vi› Føroyar at gera, spyrja fólk so.

Ta› hevur kanska ikki nógv, uttan so, at vit eru ein partur av danska kongaríkinum, og áttu í hvussu so er at veri› stoltir av tí í hesum føri.

Altso, ein heimspremiera í danska kongaríkinum. Talan er um ein 160 ára gamlan sjónleik í n‡ggjum hami. Nú má eg heldur koma til sakina.

Tom Waits hevur saman vi› konuni Kathleen Brennan sett tekst og tónleik til stykki "Woyzeck" eftir t‡skaranum, Georg Bruchner. Leikurin er settur upp í samband vi›, at Oyrasundsbrúgvin, landafrø›isliga hevur kn‡tt svenskarar og danskarar saman. Søgan er um hermannin, Woyzeck, sum fer›ast í kærleikans marrudreymi, har jalousi og vónleysur kærleiki endar vi›, at hann drepur gentuna, sum hann er forelska›ur í.

Sum Woyzeck sjálvur sigur vi› hana: "Einhvør menniskja er ein avgrund, ta› ørar fyri einum, tá i› hugt ver›ur ni›ur".

Ta› er heimskendi leikstjórin og listama›urin Robert Wilson, sum hevur sett leikin upp. Wilson og Waits hava arbeitt saman fyrr. Teir gjørdu saman vi› William S Burroughs leikin "The Black Rider", sum eg sá fyri einum ári sí›an á Betty Nansen teatrinum.

Ta› er ein stórhending í sjónleikaheiminum. Fólk koma í stimum til Keypmannahavnar, at síggja leikin. Bæ›i normenn, sviar, t‡skarar, hollendarar, eingilsmenn, ja, listin er langur av tjó›fólki, sum vitjar Keypmannahavn í hesum døgum, og ta› er nærum ómøguligt at fáa billet langt fram í tí›ina.

Tom Waits

Hvør er hesin gó›i Tom Waits? Jú, Tom Alan Waits var› føddur á baksetrinum á einum taxabili uttan fyri sjúkrahúsi› í Ponoma, Californien tann 7. december í 1949. Hann hevur tvær systrar. Foreldur hansara vóru lærarahjún. Tey skyltust, tá i› Tom var 10 ár.

Pápi Tom, Frank Waits, er av skotskum og írskum uppruna, me›an mamma hansara er av norskum uppruna, so hann hevur eitt ávíst samband vi› nor›urlond.

Sum heilt ungur var› Tom áhuga›ur í tónleiki. Tá i› poppurin kom fram í 60'unum, vildi Tom Waits ikki vera vi› meir. The Beatles, Rolling Stones og ta› slagi av tónleiki, sum hoyrdi hesari tí›ini til, seg›i honum onki, so hann leita›i aftur í tí›ina. Hann fann fram 78'ara plátusamlingina hjá foreldrum sínum, og fór at lurta eftir Perry Como, Bing Crosby, Cole Porter og ikki minst George og Ira Gershwin.

Fyrst í 70'unum arbeiddi Tom Waits á barrum ymsasta›ni í Amerika. Hann hev›i bil sín, sum hann koyrdi runt í. Á einari barr í Los Angeles, har hann arbeiddi sum duravør›ur, plagdi hann at spæla á klaveri›, tá i› tann fasti klaverspælarin hev›i ste›g. Hann spældi egnar sangir, sum hann hev›i sett tekst til. Tekstirnir l‡stu ta› prát, sum ymiskar barrflugur høvdu. Tom Waits fekk eina plátukontrakt vi› Asylum Records í 1972, og í 1973 kom út fyrsta pláta hansara, "Closing Time". Ta› mest kenda lagi› av hesari plátu, er helst "Ole '55", sum The Eagles seinni gjørdi heimskent.

Fyllubyttuárini

Ta› sum ey›kennir tí›ina frá 1973 – 1983 er, at hann livdi lívi› á sama máta, sum tekstir hansara søgdu. Hann drakk og roykti so illa hesa tí›ina, at aftaná 10 ár var hann hálvdey›ur. Hann spældi á barrum og ø›rum undirgrundarstø›um, samstundis sum hann hita›i upp fyri so stór nøvn sum: Frank Zappa, Billy Preston (kendur sum orgulspælari á plátuni "Let it Be" hjá Beatles), John Hammond (Tom Waits hevur lagt hansara seinastu fløgu tilrættis. Hon skuldi veri› komin út í heyst).

Hesa tí›ina bú›i hann á "Tropicana Motel" á Santa Monica Boulivard í Los Angeles. Í hesari fyllubyttutí›ini møtti hann songkvinnuni Rickie Lee Jones. Tey vóru saman í nøkur buldrutt ár, har rúsdrekka og anna› sleit bæ›i uppá forholdi› teirra millum og Waits sjálvan. Ta› er hon sum liggur á forhjálminum á einum bili á "Blue Valentine" plátuni. Me›an Tom bardist vi› rúsdrekka og anna›, møtti hann Francis Ford Coppola á filmselskapi hansara Zoethropa. Tom skuldi gera tónleikin til filmin "One From The Heart". Hetta var í 1979, og møtti hann núverandi konu sínari Kathleen Brennan har. Hon arbeiddi vi› handritum. Tom Sigur um hana: "Hon kann liggja á seymum, stinga ein stokk gjøgnum vørrina og drekka kaffi samstundis. Tá i› eg sá hetta, var› eg forelska›ur beinanvegin". Í 1980 giftust tey. Hann fann sta›i›, har tey skuldu giftast (married) í teimum gulu sí›unum, vi› sí›una av har ta› stó› "Masage". Hann gavst í 1983 á Asylum Records, tí teir satsa›u stórar pengar uppá hann, og fór yvir til Island Records, tí hann fann seg ikki í at gerast ein salgsvøra. Plátan hjá honum, sum eitur "Swordfishtrombone" tók allar ummælarar á bóli. Hon var naka› heilt anna› enn ta›, sum Tom Waits var vanur at gera.

Tónleikurin/tekstur

Tær fyrru pláturnar hjá Tom Waits bóru dám av, at vera sera melankolskar. Eisini hev›i hann hesar vøkru jazzbaladurnar vi›, sum ikki altí› vóru heilt stílreinar. Oftani hoyrdist ein blandingur millum tann bleyta partin av jazztónleikinum og tann bleyta partin av country tónleikinum. Vi›hvørt meir country enn jazzur og vi›hvørt meir jazzur enn country. So kann mann siga, at jazzurin er tann sum hevur yvirliva› longst í tónleikinum hjá honum. Men av og á stinga seg fram vøkur

Tom Alan Waits var› føddur á baksetrinum á einum taxabili uttan fyri sjúkrahúsi› í Ponoma, Californien tann 7. december í 1949. Hann hevur tvær systrar. Foreldur hansara vóru lærarahjún. Tey skyltust, tá i› Tom var 10 ár

countryløg.

Aftaná "Swordfishtrombone" í 1983, hendi naka› vi› tónleikinum. Ta› er líkasum, at hann torir betri at eksperimentera vi› instrumentering og sjálvum instrmentvalinum - hvørji instrument skulu til fyri at fáa tann rætta dámin fram í tónleikinum. Rútmurnar ver›a ø›rvísi. Knappliga eru marchløg, løgini sum skapa ein stemning rundan um røddina hjá honum, (hana komi eg til seinni), sum lesur upp ein tekst. Á onkrum løgum, brúkar hann sína slitnu falsettrødd til at skapa eitt teatralskan dám. Hetta hevur hann arva› frá Beatnikkarunum. Teir plagdu at lesa upp aftur vi› jazztónleiki. Tom Waits var eisini ógvuliga nógv ávirka›ur av Beatnikkarum. Menn sum Gregory Corso, Gary Snider, Allen Ginsberg, Jack Keruac og William S. Burroughs ávirka›u tekstir hansara so nógv, at summi vilja vera vi› at hann er ein rættur Beatnikkari, og ta› er hann eisini, men ikki í politiskan forstand, so sum Allen Ginsberg royndi at føra seg fram. Heldur líkist hann meira Jack Keruac og hinum á›urnevndu.

Eftir mínari meining eru tær bestu Waits pláturnar/fløgurnar, hesar meiri ekspreirimentarandi fløgurnar, har instrumentini eru t.d. gittar, vibrafon, tromma, klaver/pumpiorgul, bass. Onkuntí› eru instrumentini t.d. sag, trompet, bass, chello, violin, klarinet, trombone, trumma og so spæla tónleikararnir so, at melodiurin ljó›ar sum lírikassatónleikur. Henda lírikassaeffektin kemur mest fram í "The Black Rider", men kann eisini hómast á onkrum ø›rum fløgum. Tá i› hann skuldi taka "The Black Rider" upp, fór hann út á gøturnar í Los Angeles. Fann nakrar gøtutónleikarar, sum dugdu at spæla og tók teir vi› í studio at spæla inn tónleikin. Hetta gevur eina løgna atmosfera, sum um tú situr inni í einum stórum lírikassa og (fyri at siga ta› pent) hevur gjørt eina vánaliga avtalu vi› sjálvan fanan.

Teksturin er bygdur á eitt gamalt t‡skt ævint‡r, um henda mentamannin, i› ver›ur forelska›ur í greivadóttrini, men sum má læra seg at skjóta og raka fyri at fáa hond hennara. Hann ger eina avtalu vi› fanan, um at hann skal fáa sjey kúlur til byrsuna. Seks av teimum raka vi› vissu ta› mál, sum fríggjarin vil hava tær at raka. Men hvønn tann sjeynda kúlan rakar, avger› hin grábeinti sjálvur. Hon rakar sjálvandi fríggjaran.

Tom Waits sum "poppur"

Tom Waits er ikki heimskendur sum so. Hann hevur altí› hata poppheimin, sjálvt um eitt av hansara stóru idolum í dag, er Prince. "Hann er totalt kompromileysur", sigur Waits. Um popheimin sigur hann, "ta› er betri at síkja seg inn gjøgnum bakdyrnar, enn at ver›a bo›in vi› inn í henda heimin". Og ta› kann mann so siga er rætt. Hann er í hvussu so er ikki bo›in vi› inn í popheimin, sjálvt um hann vann eina Grammy í 1998 fyri "Mule Variations". Og ta› er ikki hann sum einsamallur hevur gkørt løg síni heimskend. Tónleikarar sum Bruce Springsteen (Jersey Girl), Eagles (Ole '55) og Rod Stewart (Tom Traubert's Blues: Four Sheets To The Wind In Copenhagen) bara fyri at nevna nakrar, hava gjørt, at Tom Waits er komin úr undirgrundini, har hann hevur liva› meginpartin av lívi sínum, og fram til eina brei›ari áhoyrarafjøld.

Røddin

Eitt anna› sum ey›kennir Tom Waits er røddin.

Henda rusta›a røddin, i› vi›hvørt ljó›ar sum onkur hevur sleppt einum seymi ni›ur í eina matarhvirlu, og sum til a›rar tí›ir ljó›ar, sum melankolskur vindur, men í síni heild, ein rødd, sum ikki er at finna nakrasta›ni, og ein útsjónd sum passar til. Hann líkist einari úthungra›ari spí›smús. So vildi lagnunnar speisemi ta›, at hann var› doyptur Waits. Or›i› "Waits" á enskum merkir: B‡artónleikari, jólatónleikari.

Sjónleikarin Waits

Tom Waits eri ikki bara kendur fyri tónleik sín. Hann er eisini sjónleikari, og hevur spælt vi› í filmum sum "Down By Law", "Short Cuts", "Ironweed", her saman vi› Jack Nicholson og Maryl Streep, "Fisher King", saman vi› Jeff Bridges og Robin Williams, "Dracula" eftir Bram Stoker, bara fyri at nevna nakrar fáar. Hann hevur komponera› tónleik til "Night on Earth" hjá Jim Jarmusch og a›rar, men ta› sum er mest áhugavert í hesum føri er, at hann hevur skríva› tekst og tónleik til fimm leikir. "Alice", "The Black Rider", "Demon Wine", "Frank's Wild Years" og so nú "Woyzeck". So hann er ikki heilt ókendur á økinum, og tí er ta› umrá›andi at vit her í Føroyum gera okkum far um henda leikin - um talenti› Tom Waits. Evni› er sum sagt alheimskent. Øll koma vit fyrr ella seinni út fyri, at uppliva størri ella smærri jalousiútbrot.

Sjálvur rendi eg meg fyri fyrstu fer› inn í tónleikin hjá Tom Waits á einum háskúla í Danmark. Ári› var 1989. Eg gjørdist so bilsin og samstundis skelka›ur av hesum manninum, hesari røddini, at eg fekk ikki anna›, enn keypt mær eina plátu av honum. Plátan kalla›ist "Rain Dog" (1985). Sí›ani tá, havi eg "dyrka›" henda løgna og serstaka listamannin.

Á›renn eg flutti heim til Føroyar, setti eg mær fyri at keypa allar fløgurnar av honum. Tær hava nú fingi› hei›urspláss› á mínari fløguhyll - allar 18 fløgurnar.

Og ta› sum eg eisini eri fallin fyri er, at ta› sum hann sigur í samrø›um, sum oftast er uppfunni› á sta›num. Hann er ein meistari, at siga frá lygisøgum - ella at seta seg sjálvan í eina stø›u, sum ikki hevur veri› úti fyri.

Hetta ger ikki at ta› sum eg her havi skriva›, er lygn. Nei, ta› er sannleikin, solei›is sum sannleikin nú einafer› sær út í tí uppfatandi eyganum.

Fløgurnar:

Closing Time: 1973
The Heart of Saturday Night: 1974
Nighthawks at the Diner (live): 1975
Small Changes: 1976
Foreign Affair: 1977
Blue Valentine: 1978
Heartattack and Wina: 1980
Swordfishtrombone: 1983
Rain Dogs: 1985
Asylum Years (uppsamling) 1986
Frank's Wild Years: 1987
Big Time (live): 1988
Night on Earth (filmstónleikur) 1992
Bone Machine: 1992
The Black Rider: 1993
Beautiful Maladies (uppsamling) 1998
Mule Variations. 1999

Tekstsitat:

At drekka
Helst eri eg fullur, men eg eri í hvussu so er ikki b‡ttur.

Fanin er ikki til, bara Gud tá i› hann er fullur.

Eg havi ongan trupulleiki av at drekka, uttan tá i› onki fái at drekka.

Klaveri› hevur drukki›, ikki eg.

Matur

Donuts eru altí› uppkalla›ir eftir horum.

Karierur

Eg kendi hann, tá i› hann var eitt onki, og hann er onki broyttur sí›an.